# Áheitan um umsiting av pensjón, viðbót til ávísar pensjónistar og útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum

eftir § 35 í almannapensjónslógini, § 3 a í lógini um viðbót til ávísar pensiónistar v.fl. og § 10 c í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

**Undirritaði/-a**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Navn | | | P – tal | |
| Bústaður (arbeiðsstaður) | | | Telefon | |
| Postnummar | | Bygd/býur | | |
| Teldupostur | | | | |
| Familjusamband við pensjónistin / heiti | | | | |

**vil við hesum gera vart við, at mett verður, at**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Navn | | | P – tal | |
| Bústaður | | | Telefon | |
| Bútilboð (heiti) | | | | |
| Postnummar | | Bygd/býur | | |

**ikki megnar at umsita sína fólka- ella fyritíðarpensjón, møguliga viðbót til ávísar pensjónistar og møguligt útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum á skynsaman hátt. Tí verður biðið um, at avgerð verður tikin um, at**

| | Set kross |
|---|---|
| starvsfólk í Almannaverkinum | ☐ |
| undirritaða/-i avvarðandi | ☐ |

**verður heimilað at umsita pensjónina v.m. vegna pensjónistin.**

**Upplýsingar um støðuna hjá pensjónistinum og grundgeving fyri áheitanini um umsiting av pensjónini v.m.**

| Set kross | Ja | Nei | | |
|---|---|---|---|---|
| Er pensjónisturin undir verjumáli/ómynduggjørdur? | ☐ | ☐ | Navn á verja | |
| Verður pensjónisturin umsitin í løtuni | ☐ | ☐ | Navn á umsitara | |
| Dugir pensjónisturin at lesa? | ☐ | ☐ | Støði: (svarandi til skúlaflokk) | |
| Dugir pensjónisturin at skriva? | ☐ | ☐ | Støði: (svarandi til skúlaflokk) | |
| Dugir pensjónisturin at rokna? | ☐ | ☐ | Støði: (svarandi til skúlaflokk) | |
| Møgulig diagnosa (sjúka) | | | | |



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

**Frágreiðing – lýs vantandi førleikarnar hjá pensjónistinum at umsita sína pensjón v.m**

| |
|---|
| |

| Set kross | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Er pensjónisturin kunnaður um hesa áheitan? | ☐ | ☐ |
| Góðtekur pensjónisturin, at starvsfólk í Almannaverkinum / avvarðandi umsita pensjónina v.m.? | ☐ | ☐ |
| Eru avvarðandi kunnað um hesa áheitan? | ☐ | ☐ |

**Viðmerkingar frá avvarðandi og/ella pensjónisti**

| |
|---|
| |

**Váttan**

| Dagfesting | Undirskrift eindarleiðari / starvsfólk / avvarðandi |
|---|---|
| | |

**Áheitanin skal sendast ella latast inn til Almannaverkið.**



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

**Lógarheimild**

**Almannapensjónslógin**
**§ 35** Varnast Almannaverkið, at ein pensjónistur eitt nú vegna sálarsjúku, menningartarn, heilaskaða, sinnisbrek ella vegna rúsmisnýtslu ikki megnar at umsita pensjónina, undir hesum um viðkomandi ikki megnar at halda sínar skyldur mótvegis útleigara, kann Almannaverkið:
1) taka avgerð um, hvussu pensjónin skal útgjaldast, ella
2) taka avgerð um, at avvarðandi ella starvsfólk í Almannaverkinum ella á vardum bústaði umsita pensjónina hjá pensjónisti.
Stk. 2. Pensjónin skal umsitast samsvarandi áhuga og vilja borgarans
Stk. 3. Pensjónisturin og Almannaverkið kunnu avtala, at Almannaverkið umsitur pensjónina.
Stk. 4. Pensjónisturin skal hoyrast í tann mun, viðkomandi er førur fyri hesum, áðrenn Almannaverkið tekur avgerð sambært stk. 1.
Stk. 5. Almannaverkið skal ansa eftir, at pensjónistur, ið er undir umsiting sambært stk. 1, ikki verður fyri misnýtslu alla sviki
Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri um umsiting av pensjón, undir hesum reglur um eftirlit.

Heimildin í § 3 a í lógini um viðbót til ávísar pensiónistar v.fl. (brennistudning) er samsvarandi.

**Lógin um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn**
**§ 10 c.** Varnast Almannaverkið, at ein persónur eitt nú vegna sálarsjúku, menningartarn, heilaskaða, sinnisbrek ella misnýtslu ikki megnar at umsita arbeiðsmarknaðareftirlønina, kann Almannaverkið:
1) taka avgerð um, hvussu upphæddin skal útgjaldast, ella
2) taka avgerð um, at avvarðandi ella starvsfólk í Almannaverkinum ella á vardum bústaði skal umsita upphæddina hjá pensjónisti.
Stk. 2. Upphæddin skal umsitast samsvarandi áhuga og vilja borgarans
Stk. 3. Pensjónisturin og Almannaverkið kunnu avtala, at Almannaverkið umsitur upphæddina.
Stk. 4. Pensjónisturin skal hoyrast í tann mun, viðkomandi er førur fyri hesum, áðrenn Almannaverkið tekur avgerð sambært stk. 1.
Stk. 5. Almannaverkið skal ansa eftir, at pensjónistur, ið er undir umsiting sambært stk. 1, ikki verður fyri misnýtslu alla sviki
Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um umsiting av arbeiðsmarknaðareftirløn, eitt nú reglur um eftirlit.

**Treytir, tá avvarðandi umsita pensjón**
Tá avvarðandi umsitur pensjónina, møguligan brennistudning og útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum hjá pensjónisti, hevur viðkomandi fulla ábyrgd av teimum fíggjarviðurskiftum, sum eru tengd at hesum veitingum hjá pensjónistinum. Samstundis hevur Almannaverkið eftirlit við umsitingini, og skulu hesi fíggjarskjøl regluliga latast Almannaverkinum:

Kontuavrit saman við kvittanum fyri øll keyp
Kontuavrit skulu latast inn av øllum kontum, ið viðvíkja pensjónini, brennistudninginum og útgjaldinum úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum
Fastar útreiðslur skulu, eins og allar aðrar útreiðslur, skjalprógvast

Umsitingarheimild kann einans latast til pensjón útgoldin eftir almannapensjónslógini, viðbót til ávísar pensjonistar (brennistudningur) og útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.


Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo